# Býráðið

**Dagfesting:** 27.03.2025 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir: Jóna Astrid L. Lambastein fyri Ólav Larsen, Linda Toftegaard fyri Eyðun á Lakjuni og Leif André Eliasen fyri Jóan Paula Olsen

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 12/25 | 25/00207-1 | Innkalling av tiltakslimum til býráðsfundin 27.03.2025 |
| 13/25 | 25/00091-1 | Starvsfólkahondbókin - uppskot til broyting av vegleiðing um Eldraviðurkiftir |
| 14/25 | 25/00195-1 | Umbøn um eykajáttan til nýggja køkin á Vesturstovu |
| 15/25 | 25/00049-2 | Tilboð um keyp av innangarðsjørð, matr.nr. 5a |
| 16/25 | 22/00593-24 | Ognartøka av matr. nr. 239aq |
| **Til kunning** | | |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til støðutakan**

## 12/25
## 25/00207-1 Innkalling av tiltakslimum til býráðsfundin 27.03.2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.03.2025 | 12/25 |

**Tilráðing**

<table>
<tr><td>Til viðgerðar í</td><td colspan="3">Býráðnum</td></tr>
<tr><td>Stutt lýsing av málinum</td><td colspan="3">Býráðslimirnir Ólavur Larsen á Lista Á, Jóan Pauli Olsen á lista F og Eyðun á Lakjuni á lista B hava boða frá at teimum berst frá, at møta á býráðsfundinum 27. mars 2025 og ynskja tiltakslimirnar innkallaðar.<br><br>Fimt valda við 49 atkvøðum á Lista Á, sambært gerðabókini hjá valstýrinum fyri kommunuvalið, Gudny Vang hevur boðað frá, at hon ikki kann møta og er sætt valda Jóna Astrid Lambastein við 41 atkvøðum innkallað fyri Ólav Larsen.<br><br>Fjórð valdi á lista F við 31 atkvøðum, Leif André Elisasen er innkallaður fyri Jóan Paula Olsen.<br><br>Triðja valda á lista B við 34 atkvøðum og lutakasti, Linda Toftegaard er inkallað fyri Eyðun á Lakjuni.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Kommunustýrislógin<br>Møgulig fylgiskjøl<br>• Gerdabók kommunuvalid 2024</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>N</td><td>n</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>N</td><td>n</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Býráðið skal taka støðu til um treytirnar fyri at kalla Jónu Astrid Lambastein inn, sum tiltakslim fyri Ólav Larsen eru loknar.</td></tr>
</table>

2

| | |
|---|---|
| | Býráðið skal taka støðu til um treytirnar fyri at kalla Leif André Eliasen inn, sum tiltakslim fyri Jóan Paula Olsen eru loknar.<br><br>Býráðið skal taka støðu til um treytirnar fyri at kalla Lindu Toftegaard inn, sum tiltakslim fyri Eyðun á Lakjnui eru loknar. |
| Dagf | 21.03.2025 |

**Býráðið 27. marts 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum.

## 13/25
## 25/00091-1 Starvsfólkahondbókin - uppskot til broyting av vegleiðing um Eldraviðurkiftir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.02.2025 | 11/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 23/25 |
| 3 Býráðið | 27.03.2025 | 13/25 |

## Tilráðing

<table>
<tr><td>Til viðgerðar í</td><td>Fíggjarnevndin</td></tr>
<tr><td>Stutt lýsing av málinum</td><td>19. februar 2025<br>Í starvsfólkahondbókini hjá Fuglafjarðar kommunu, skjal 5.05 Eldraviðurskifti» er fráfaringaraldurin ásettur til at vera 70 ár. Vegleiðingin bleiv seinast broytt í 2023, har fráfaringaraldurin bleiv broyttur frá 67 ár til 70 ár.<br><br>Fyrisitingin leggur málið fyri enn einaferð, tí ynski er um at fylgja somu vegleiðing sum er galdandi fyri sáttmálasett starvsfólk sum eru í starvið hjá tí almenna. Vegleiðingin hjá Landinum kom í einum rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum tann 9. mars 2022. Her stendur um Fráfaringaraldur:<br><br>4. Fráfaringaraldur<br>4.1. Fráfaringaraldurin hjá sáttmálasettum almennum starvsfólkum er 72 ár.<br><br>4.2. Tað áliggur almenna arbeiðsgevaranum at siga alment sáttmálasettum starvsfólki upp í so góðari tíð, at tey kunnu fara úr starvi við endan á tí mánaði, tey fylla 72 ár.<br><br>4.3. Arbeiðsgevarar kunnu tó velja at leingja setanina, eftir at starvsfólk hava fylt 72 ár. Tað verður gjørt við at seta starvsfólkið í eitt upp í tvey ára tíðaravmarkað starv.<br><br>4.4. Leingjan sambært nr. 4.3 kann verða gjørd fleiri ferðir<br><br>Tórshavnar kommuna valdi í 2022 at avtaka fráfaringaraldurin, meðan fráfaringaraldurin í Runavíkar kommuna og Eysturkommunu er 70 ár. Í Klaksvíkar kommunu er ongin samtykt um fráfaringaraldur.</td></tr>
</table>

4

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">20. mars 2025<br>Vegleiðing um Eldraviðurskifti hevur verið til hoyringar hjá leiðslu og álitisumboðum hjá Fuglafjarðar kommunu. Ongin viðmerking var komin til broytingarnar tá ið freistin var farin. Málið verður tí sent aftur til fíggjarnevndina til góðkenningar.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Fyrisitingin ynskir, at fráfaringaraldurin hjá kommununi svarar til fráfaringaraldurin hjá landinum.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3"><ul><li>Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Rundskriv um fráfaringaraldur (til stjórnarráðini og stovnar undir landinum)</li><li>Møgulig fylgiskjøl<br>Uppskot til vegleiðing 5.05 Eldraviðurskifti</li></ul></td></tr>
<tr><td colspan="3">Viðgerð</td><td></td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">19. februar 2025<br>Mælt verður til at fíggjarnevndin tekur støðu til, um fráfaringaraldurin hjá Fuglafjarðar Kommunu skal samsvara við fráfaringaraldurin hjá almennu stovnunum hjá landinum.<br><br>20. mars 2025<br>Málið hevur verið til hoyringar hjá hjá umboðum fyri starvsfólkini og leiðarar í Fuglafjarðar kommunu og ongar viðmerkingar er komnar inn. Mælt verður til at Fíggjarnevndin endaliga tekur undir við tilmælinum og leggur tað fyri býráðið til góðkenningar.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">27. januar 2025</td></tr>
</table>



**Fíggjarnevndin 19. februar 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum og sendir málið til hoyringar í hjá starvsfólki og leiðarum.

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við, at fráfaringaraldurin hjá starvsfólkum í Fuglafjarðar kommunu fylgir fráfaringaraldrinum hjá almennu landsstovnunum og mælir býráðnum til, at góðkenna hetta.

**Býráðið 27. marts 2025:**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

14/25

## 25/00195-1 Umbøn um eykajáttan til nýggja køkin á Vesturstovu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 24/25 |
| 2 Býráðið | 27.03.2025 | 14/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndin |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Í 2024 var íløgujáttanin til køkin á Vesturstovu kr. 5 mill. Tá ið arbeitt bleiv við fíggjarjáttanini fyri 2025 var greitt, at køkurin ikki bleiv liðugur fyrr enn fyrsta kvartal 2025, og at tað ikki bleiv møguligt at brúka alla íløgujáttanina í 2024. Tí skuldi tann játtanin sum ikki bleiv brúkt í 2024 framflytast til íløgujáttanina fyri 2025.<br><br>Onkur misskiljing er tó hend, tí tað hevur víst seg, at tað bert eru framfluttar kr. 500.000, og við árslok, vóru kr. 2.593.981 eftir av játtanini. Tvs. at 2.093.981 kr. mangla at blíva framfluttar til íløgujáttanina fyri 2025<br><br>Av tí at framflytingin ikki er hend í sambandi við fíggjarjáttanararbeiðið 2025, má málið fyri fíggjarnevndina og býráðið sum ein umbøn um eykajáttan uppá 2.093.981 kr. svarandi til tað sum er eftir av íløgujáttanini frátrekt 500.000 sum bleiv framflutt til fíggjarjáttan 2025.<br><br>Afturat hesum er eitt ynski um at seta eina dupulta løgistøð til elbilar upp á Vesturstovu. Hettar hevur ikki verið partur av verkætlanini, og er tí ikki við í upprunaligu játtanini. Tó hava vit í verkætlanini verið so framsíggin, at nýggja eltalvan er gjørd klár til at ein løðistøð kann setast upp. Ein einkult løðistøð frá SEV kostar uml. 35.000 kr. Vit meta, at tað er tørvur á einari dupultari løgistøð. Metti kostnaðurin fyri eina dupulta løgistøð og kaðararbeiðið er 100.000 kr. við mvg.<br><br>Nánd arbeiðir við at samla allar trýggjar køkarnar sum Nánd í løtuni rekur á Vesturstovu. Nýggjur køksleiðari er settur, og nakrir fundir hava verið við hana nú tað nærkast, at køkurin verður liðugur. Tað hevur víst seg, at kóki og steikikapasiteturin verður ov lítil, og at vit tí mugu keypa ein ovn afturat, eina steikiplátu og eina størri grítu enn tann sum upprunaliga er bíløgd. Neyðugt er at trekkja ein nýggjan elkápil til eyka ovn og steikipannu. Samanlagt verður talan um eina metta meirútreiðslu uppá kr. 250.000 við mvg. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">
<table>
<tr><th>Hvat verður biðið um:</th><th>Upphædd:</th></tr>
<tr><td>Framflyting av játtan frá 2024</td><td>2.093.981</td></tr>
<tr><td>Uppstigan av køksútgerð</td><td>250.000</td></tr>
<tr><td>Løðistøð til elbilar</td><td>100.000</td></tr>
<tr><td>Í alt:</td><td>2.443.981</td></tr>
</table>
</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Umbøn um eykajáttan og framflyting av íløgujáttan frá 2024</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>x</td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur støðu til umbøn um eykajáttan</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">14-03-2025</td></tr>
</table>



**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við eykajáttanini og mælir býráðnum til, at góðkenna hesa við 1. viðgerð 27. mars. 2025.

**Býráðið 27. marts 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanini og sendir málið víðari til 2. viðgerð.

**15/25**
**25/00049-2 Tilboð um keyp av innangarðsjørð, matr.nr. 5a**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.02.2025 | 5/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.01.2025 | 6/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 26/25 |
| 4 Býráðið | 27.03.2025 | 15/25 |

8

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Tekniska nevnd og fíggjarnevnd | | |
| Stutt lýsing av málinum | Fundur hevur verið á kommunuskrivstovuni hin 3. januar, har umboð frá kommununi saman við einum av eigarunum vóru til staðar. Fuglafjarðar kommuna fekk á fundinum bjóða at keypa innangarðsjørðina tilhoyrandi matr. nr. 5a. Talan er um 5.698,5 kvm við ástandandi seyðahúsið (94kvm í tveimum hæddum). Uttangarðsjørðin er ikki partur av tilboðnum. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Eigarar av matr.nr. 5a hava víst seg til kommununa um at selja innangarðjørðina av matr.nr. 5a til Fuglafjarðar kommunu | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Av tí at allir matrikklarnir 5a liggja í lendi har komandi útstykkingar hjá Fuglafjarðar kommunu kunnu gerast aktuellar, mælir tekniski leiðari til at keypa jørðina fyri ásetta prísin. | | |
| Dagf | 14.01.2025 | | |

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við at keypa lendi til tann prísin, sum verður samtyktur í løgtininginum í 2025. Núverandi prísur kann útgjaldast og ein regulering gjaldast seinni tá endaligi prísurin er kendur.

**Tekniska nevnd 10. februar 2025:**
Tekniska nevnd fylgir einmælt tilmælinum frá tekniska leiðara

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við at keypa lendi til tann prísin, sum verður samtyktur í løgtininginum í 2025. Núverandi prísur kann útgjaldast og ein regulering gjaldast seinni tá endaligi prísurin er kendur.

**Býráðið 27. marts 2025:**
Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini 20 marts. 2025. Dávur Juul, Eivin Breiðaskarð, Leif André eliasen, Kristian Martin Petersen og Linda Toftegaard atkvøddu fyri meðan Sonni á Horni, Ørvur Jacobsen, Jastrid á Dalbø og Jóna Astrid Lambastein atkvøddu ímóti. Tilmæli varð sostatt samtykt.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**16/25**
**22/00593-24 Ognartøka av matr. nr. 239aq**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2025 | 14/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 20/25 |
| 3 Býráðið | 27.03.2025 | 16/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Síðani 2022 hevur verið samskift við eigara av matr. nr. 221, Fjalshaga og Fuglafjarðar kommunu har eigarin av matr. nr. 221 ynskir at keypa part av lendinum, sum verður kallað Fiskirás, til grundstykki at leggja afturat matr. nr. 221, meðan kommunan ynskir at keypa partar av vegnum til veg og gongubreyt.<br><br>Í oktober 2023, varð omanfyrinevnda økið frámatrikkulera innangarðsmatriklinum hjá Fjalshaga, matr. nr. 239v og fekk matr. nr. 239aq. Í samráð við eigararnar av 239aq er ætlan gjørd fyri økið har kommunan fær partar av matr. nr. 221, so pláss er fyri vegi og gongubreyt meðan eigarin av matr. nr. 221. fær umleið 260 m$^2$ av økinum oman fyri matr. nr. 221. Ætlanin er at kommunan keypir matr. nr. 239aq frá Fjallshaga fyri síðani, at marknaðarumskipa og víðarifakturera tær umleið 260 m$^2$ til eigaran av matr. nr. 221.<br><br>Viðmerkjast skal at 260m$^2$ er ikki nóg stór vídd at byggja sethús á sambært byggisamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu og gevur tí ikki meining at bjóða út. Hinvegin gevur tað betri møguleikar hjá eigaranum av matr. nr. 221 at byggja sethús eins og kommunan fær betur umstøður til veg og gongubreyt.<br><br>Síðani oktober 2023, t.v.s. í 1½ ár hevur Fuglafjarðar kommuna roynt, at keypa matr. nr. 239aq frá Fjalshaga, sum eisini ynskir at selja økið til kommununa. Av tí at eigaraviðurskiftini er soleiðis hátta at 6 hagar eiga 7. hagan Fjalshaga, hevur tað víst at verða ein ógvuliga tvørlig tilgongd at fáa keypt økið, har skeytið ferð eftir ferð er burturvíst av Tinglýsingini.<br><br>Seinasta burturvísingin vísir at nýggj hagastevna skal til í øllum 7 høgunum um vit skulu koma víðari við málinum og tað er framvegis |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">tengt at stórari óvissu. Seinast tók tað 7 mánaðir frá tí kommunan sendi áheitan til hagarnar til síðsta svarið varð móttikið.<br><br>Umsitingin metir ikki, at ein tilgongd við 7 nýggjum hagastevnum, orku og tíð, sum skal nýtast til hetta stendur mát við keypinum av matr. nr. 239aq.<br><br>Alternativt ber til at ognartaka økið eftir heimildunum í §12 í Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Sambært kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu §24, 9. petti, sendir Tekniska nevnd umvegis Fíggjarnevndini tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt:<br>• Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu.<br>• Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.<br>• Byggisamtyktin fyri Fuglafjarðar kommunu oktober 2018.<br>Møgulig fylgiskjøl:<br>• Málsyvirlit – 23/00158 Fjallshagi lendi í Fløtugerði<br>• Málslyvirlit - 22/00593 Matr. nr. 239v, marknaumskipan framvið FiskarásNýtt matr. nr. 239aq<br>• Tekning av marknaðumskipan matr. nr. 221 og matr. nr. 239aq í Fuglafirði<br>• Skjøl í seinast burturvísta skeyti frá Tinglýsingini<br>• Útkast ætlanarskriv um ognartøku</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>j</td><td>n</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>n</td><td>n</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Allir hagarnir eru sinnaðir at selja og Fuglafjarðar kommunu er sinnað at keypa matr. nr. 239aq, eins og kommunan er áhugað í at keypa til fermeturprísin hagin ynskir fyri matrikulin. Av tí at tilgongdin at keypa frá høgunum hevur víst seg at verða ogvuliga tvørlig verður mælt til at fara undir eina tilgongd at ognartaka matr. nr. 239aq.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">04.03.2025</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Tekniska nevnd 10. mars 2025:**
Meirilutin í teknisku nevnd, Eyðun á Lakjuni og Kristian Martin Petersen fylgja tilmælinum um ognartøku. Sonni á Horni fylgir ikki tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Meirlutin Eyðun á Lakjuni og Dávur Juul taka undir við tilmælinum um, at 239aq verður ognartikið. Ólavur Larsen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðið 27. marts 2025:**
Atkvøtt varð fyri ognartøkuni. Linda Toftegaard, Kristian Martin Petersen, Leif André Eliasen Eivin Breiðaskarð, Dávur Juul, Astrid Jóna Lambastein og Jastrid á Dalbø atkvøddu fyri. Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni atkvøddu blankt. Málið er sostatt samtykt.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 20.30

Dávur Juul

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Jastrid á Dalbø
KRISTIAN MARTIN PETERSEN

Jóna Astrid Lambastein

Leif André Eliasen

Linda Toftegaard

13